LM-099/2023

Fylgiskjal 84

Hoyringsskriv – "Burðardygg ferðavinna".

Høgni Hoydal, Landsstýrismaður í landbúnaðarmálum

Vit vilja gjarna fortelja tær eina søgu Høgni. Eina lítla søga, sum eigur at fáa stóran týdning.

Tú sum sigur teg hugsa um ta stóru myndina; Um tú skalt skilja avleiðingarnar, so noyðist tú at hava allar tær mongu smáu myndirnar í huga.

Vit fóru tveir burtur í haga, ein yngri maður og ein tilkomin maður. Hetta var ikki nakar stuttleikatúrur. Vit vórðu til arbeiðis í okkara egna haga. Vit skuldu norðureftir at grava fyri bólum. Gróvu úr bólunum í gjáunum. Og so fóru vit norður í bólið norðanfyri áirnar í Móisdali, sum er norðuri á bakkanum.

Í einum gili í Móisdalsáum, har liggur ein lambsjúk ær. Hon lá soleiðis fyri at hon lá undan okkum. Høvdið vendi norðureftir. Og hon sá okkum ikki. Tí komu vit tíverri so knappliga á hana, at hon gjørdist bangin og leyp avstað. Og bæði lombini komu úr henni. Vit royndu at fara aftaná henni, og at reka hana til lombini. Men til fánýtis. Ærin vildi ikki kennast við síni egnu lomb.

Vit rokna við, at tú skilir hvat tað er sum vit royna at fortelja tær.

At vit, sum eru vanir frá barnsbeini av at ganga í okkara haga, og at røkta okkara haga, vit kenna sjálvandi hagan betri enn nakar annar. Og vit hava størri umsorgan fyri haganum, og plantu- og djóralívinum, enn nakar annar. Sjálvt vit, sum eru vanir at vera har, og hava lóglig neyðug arbeiðsørindi í okkara egna haga kunnu koma so óheppið fyri, at vit gera ónáðir. Hagin og lívið sum hoyrir heima í haganum, hevur fyrst og fremst brúk fyri friði, frá okkum menniskjum.

Hvussu fer tað at verða, um títt lógaruppskot gerst veruleiki Høgni? Tá allur heimurin fær frítt at fara í øllum høgum? Tá fleiri hundraðtúsund fremmandafólk, sum onki skil hava fyri høgunum og tí vøkstri og djóralívi sum har býr, fara at kleyra fyrilitarleyst aftur og fram?

Hvussu stóran skaða fer hetta ikki at gera móti náttúruni? Tað kanst tú sjálvur ímynda tær.

Og tí skalt tú ikki kalla hetta lógaruppskotið «burðardygt».

Vit vilja við hesum skrivi staðiliga heita á teg, um ikki at bera hetta lógaruppskotið í tingið.

Vit vilja eisini við hesum skrivið minna teg á tínar skyldur, sum landsstýrismaður í landbúnaðarmálum, at tú ikki gert teg so ógvusliga inn á tann landbúnað og ta mentan sum hevur so stóran týdning fyri fleiri túsund føroyskar familjur úti um alt landið.

Uppskotið er óumhugsað og serstakliga ógreitt. Og tað ber brá av vantandi vitan um, og vantandi virðing fyri landbúnaði og náttúru. Avleiðingarnar av uppskotinum eru beinleiðis vandamiklar fyri landbúnað og náttúru, fyrst og fremst tí tit blanda tvey ting saman sum als ikki hoyra saman.

Hvat hava ferðavinna og universellur hvørsmansrættur at gera í eini lóg, sum einamest snýr seg um at taka rættindi frá høgunum, og møguleikar frá høgunum?

Ferðavinnan er undir ongum umstøðum burðardygg, og tað verður hon so undir ongum umstøðum við at tit loyva øllum heiminum at kleyra allar hagarnar í Føroyum niður.

Tí er tað tilvitað villeiðandi, at tit prýða eina lóg, sum fer at spilla náttúruna og gera tað ógjøligt at dríva landbúnað, fyri "burðardygga ferðavinna."

1.

Í høvuðsheitum snýr lógin seg um at taka ognar- og avgerðarrættin frá føroyskum festarum og bóndum, sum royna at ansa eftir náttúru, djóralívi og landbúnaði, fyri síðani at lata rættin til at dríva ferðavinnu inni á ognini hjá okkum, og vinningin av at selja okkara haga, til øll onnur, enn okkum sum eiga jørðina.

Sjálvi hava vit ongan áhuga í ferðavinnu. Vit vilja als ikki hava fremmandafólk í okkara haga, og vit fara at hevda okkara rætt til at nokta útlendskum ferðafólki at fara í okkara haga. Hagin, og lendi og djóralívið hevur fyrst og fremst brúk fyri friði, frá fólki.

Samstundis virða vit ognarrættin hjá øðrum hagapørtum, og einkarrættin hjá øðrum høgum at fáa onkran vinning av ferðavinnu, sum kann gerast eitt ískoyti afturat landbúnaðinum. Tað er meting gjørd í viðmerkingunum til lógina, um at ferðavinnan fer at virka betri við nýggju ferðavinnulógini, í mun til hvussu ferðavinnan hevur virkað við teimum vælskipaðu jarðalógum.

Ein búskaparfrøðingur vísir í eini grein, hvussu nógv inntøkurnar hjá ferðavinnuni eru vaksnar seinasta ári. Hann gloymir tó at siga, at inntøkurnar eru vaksnar, eftir kørmum í verandi jarðalógum. Galdandi jarðarlógir eru tann einasti mátin vit kunnu stýra ferðavinnuni, so náttúran ikki forferst.

2.

Viðmerkingarnar til lógaruppskot nevnir einki um at løgtingið skal fyrihalda seg til Grundlógina. Men tað noyðist uppskotið at gera, um tit vilja innføra ein universellan hvørsmanrætt. Tí hvussu tit so venda og snara tí, so krevur hvørsmansrættur fyri fremmandafólk, at tit hava rættin til at gera tykkum so dyggiliga inn á privata fasta ogn hjá øðrum. Og tað gerst ikki, uttan við ognartøku.

a. GRL grein 73 sigur" Ejendomsretten er ukrænkelig"

b. Einki verður nevnt í vm til lógaruppskotið um ognartøku.

Treytin fyri ognartøku er, at kravið um almennvellet er lokið.

Einki verður sagt, um ferðavinnulógin er umfatað av løgfrøðiliga hugtakinum "almennvellet".

Almenvellet vísir til føroyingar, borgarar í Føroyum. Tá snýr tað seg um ognartøku, t.d. í samband við eina, fyri føroyska almenningin neyðuga íløgu, kirkju, skúla, vegagerð, o.t.

Men tað fer ikki at eydnast tykkum, at "strekkja» grundlógartryggjaða atlitið til "almenvellet" til frama fyri føroyingar, og víðka hetta til alheimsins fremmandafólk.

Tað fer ikki at eydnast tykkum at ognartaka privata ogn hjá føroyingum, fyri at geva okkara hagapartar til útlendingar, og til ferðavinnuna.

Gera tit tað kortini, noyða tit okkum samstundis at stevna stríðsmálið inn fyri dómstólarnar.

c. Einki verður nevnt um í viðmerkingum til lógina, um at inntrivini í ognar- og ræðisrættin eru so stór, at talan er um ognartøku ella ognartøkuinntriv við endurgjaldsábyrgd mótvegis jarðaeigarum.

Sum dømi verður t.d. víst til teir hagapartar úti um landi, sum hava gjørt stórar íløgur, grundað á verandi lógina, og hava lagt til rættis eftir langtíðar útlitum. Vandi er fyri, at um nýggja lógin kemur í gildið, so fara fleiri lokalar fyritøkur at fáa stór tap, av lógarbroytingini. Hetta skal kompenserast fult út, og verður tað ein dyggur smeitur fyri landskassan.

3.

Uppskotið ásetur, at ræðisrætturin verður tikin frá jarðaeigarum, sum eigur rættin at avgera hvør kann fara í hagan, og seta treytur um nær og hvar kann farast, og seta ein staðkendan ferðaleiðari á hagatúrinum hjá ferðafólkunum, sum vanliga hevur ábyrgd av ferðafólk ikki órógva náttúru, djóralív, seyðhald, og hevur abýrgd av, at fólkini ikki ganga seg í óføri, men vera trygg førd heimaftur í øllum góðum.

Jarðaeigarar missa harumframt rættin til at krevja gongugjald, sum hevur verið ein avgerandi inntøka fyri at jarðaeigar, og ikki minst grundarlagið fyri, at teir kunna reka ferðavinnu í tøttum samstarvi við ferðavinnuskrivstovur. Ferð eftir ferð verður greitt frá alment, hvussu væl samstarvið millum hagapartar og føroyskar ferðaleiðarar og ferðavinnufeløg eru skipaði.

Harumframt verður ognar- og ræðisrætturin til at stýra síni egnu fastu ogn í stóran mun skerdur, tí landstýrismaðurin kann til eina og hvørja tíð seta eitt ótal av kunngerður í gildið. Kunngerðirnar fara at regulera hvat eigarnir kunna og ikki kunna gera á teirra egnu føstu ogn. Harumframt kann landstýrismaðurin seta fleiri kunngerðir í verk móti kommunum , sum óbeinleiðis eisini fara at raka jarðaeigarar.

Einki verður sagt um hvussu nýggja lógin fyriheldur seg til tær nógvu jarðalógirnar tvs. hvør lóg hevur forrang og um hvør myndugleiki avgerð trætumál.

4.

Høvuðsendamálið í uppskotinum er, at taka ræðisrættin frá høgunum til at kunna stýra sínum egna landbúnaðarvirksemi og øðrum virksemi, og eisini til sjálvi at skipa fyri ferðatúrum í høgunum og at banna høgunum at taka gongugjald. Í kunngerðum við heimild í lógini hevur landstýrismanninum rætt til at skerja ræðisrættin hjá jarðaeigarum á teirra egnu privatu ogn uppaftur meira, uttan at jarðaeigarnir enn at vita hvørjar skerjingar av ræðisrættinum fara at vera í kunngerðunum. Hetta er, í sjálvum sær, ein stór hóttan móti rættartrygdini.

Í lógaruppskotinum verður innførdur ein hvørsmannsrættur til allar heimsins borgar at ganga frítt allstaðni í øllum høgum, eisini i høgum sum er privat fast ogn hjá túsundtals føroyskum familjum ímóti at sokallað náttúruverndargjald á kr 150 pr ferða ferafólk. Av hesum gjaldið fáa teir 470 hagarnir bert 25%, aftaná umsitingargjaldið er drigið frá.

5. Í uppskotinum er ásett, at kommunurnar skulu stíla fyri ferðavinnuætlanum og ferðatúrum eftir einum leisti, sum landstýrismaðurin skal góðkenna. Harumframt hevur Høgni Hoydal í uppskotinum ásett, at hann til eina og hvørja tíð kann áleggja kommunum tungar fíggjarligar lógarbundnar skyldur t.d. at Vága kommuna skal rinda gongugøtur úr Sandavági og norð á Slættanes og síðan gongugøtu av Slættanesi vestur til Gásadals.

Ein stórur avgerandi munur millum verandi jarðalógir og hetta lógaruppskotið er, hvør skal hava eftirlit av ferðafólki í haganum, tá tey eru gongutúri.

Við verandi jarðalógum, er tað hagin, í samráð við eina ferðvinnuskrivstovu, sum skipar fyri hagatúrinum. Henda avtala innber ofta at hagin fær gongugjald. Við hesum gongugjald er grundarlag fyri hjá jarðaeigarum at seta staðkendan føroyskan feraðleiðara sum hevur ábyrgdina, og eftirlit við at alt gongur rætt og trygt fyri seg á túrinum, at seyðurin og fuglurin og lendi fær mest møguligan frið, og at ferðafólkini koma aftur í øllum góðum.

Um nýggja ferðavinnulógin kemur í gildi, sum fer at tryggja øllum heimins borgarum at ganga frítt allastaðni, tekur tann stóri spurningur seg upp, um hvør skal hava eftirlit við at ferðafólk yvirhalda ásetingar um ikki at órógva náttúru og djóralív og at tey ikka ganga seg óføri og koma trygt heimaftur: Sum dømi verður víst, at um ein týskari býr á einum gistingarhúsi í Tórshavn: Hann leigar ein bil og fer einsamallur til fjals í einum haga. Hvussu kunna vit tryggja okkum at hesin yvirhaldur ásetingar, og vísir fyrilit fyri náttúru, blómum, djórum, hegni, garðum, rásum, o.s.fr og at hann ikki gongur seg í óføri og eitt stórt og kostnarmikið bjargingartiltak við leiting má setast í verk?

Tá jarðaeigarar hava mist rættin at ráða í sínum egna haga, og at stíla fyri hagatúrum og teimum er bannað at taka gongugjald og við kunngerðum vera skerdir á hendan ógvusliga hátt, so kann tað ikki skiljast øðrvísi enn at Høgni Hoydal í uppskotinum hevur givið jarðaeigarum reyða kortið. Tá kann ikki væntast at ein bóndi ella røtingarmaður skal átaka sær hesa uppgávu, serliga við atlitið til at uppskotið beinleiðis eggjar fremmandafólkum til at tey kunnu fara sum tey vilja har sum tey vilja, og gera sum tey vilja. Ferðslan í haganum fer at økjast í stórum, og avleiðingarnar verða hareftir.

Tað stendur at kommunan skal hava ábyrgd av øllum møguligum viðurskiftum, og at stíla fyri túrum og tryggja skilhald við góðkenning frá landsstýrismanninum. Men eitt er vist, at kommunan fer ikki at seta fleiri fólk í starv, at gera ferðavinnuætlanir, og at gera kunningarætlanir, og at gera vesir og skeltir og gøtur fyri milljónir krónur, ei heldur fyri at ganga runt við ferðafólki, og at hava eftrilit við ferðafólki. Tað hevur kommunan ongan áhuga í, tí tað kostar alt ov nógv. Og stóri taparin av, at ongin hevur ábyrgd, og at eingin hevur eftirlit, tá hagarnir eru settir til viks inni á síni egnu ogn, tað er lokala náttúran, og lokali landbúnaðurin.

Fyri kunna tryggja nátturuna, fugla-og djóralív, seyðahald og seyðarakstur og tryggja at ferðafólk ikki ganga seg í óføri, so at ein leiting má setast í verk, og at fólkini koma heimaaftur í øllum góðum, so sigur tað seg sjálvt, at tað er betri at reka ferðavinnu við verandi jarðarlógum, enn teimum sera ófrættakendu kørmum, sum fara at galda, um hendan ferðavinnulógin kemur í gildi.

Vit taka harðliga frástøðu frá uppskotinum, og vilja mæla landsstýrismanninum til, ikki at bera tað niðan í tingið. Sum tú longu veitst, er mótviljin móti tínum lógaruppskoti stórur. Roknar tú við, at mótviljin verður minni úti um landið, um hetta uppskotið verður samtykt sum galdandi lóg?

Fyri at taka afturíaftur: Vit taka als ikki undir við hesu lóg. Roynir tú at noyða hesa ófrættakendu lógina niðuryvir føroysku hagarnar, so fer tað at skapa stóra mótstøðu.

Tað fer ikki at eydnast tær at ognartaka fasta privata ogn hjá føroyingum, fyri at geva okkara hagapartar ókeypis og óskipað til fremmandafólk, og til ferðavinnuna. Vit vilja als ikki hava ferðafólk í okkara haga.

Gert tú tað kortini, so noyðir tú okkum samstundis at stevna stríðsmálið inn fyri dómstólarnar.

Vegna Hagastýrið fyri hagapartin fyri Norðan, Kunoy

Páll Gunnhard Poulsen, Jógvan Súni Michaelsen, Jógvan Heinesen

23 .februar 2024